

## Leita eftir Norsku Løvu

Leingi hevur verið leitað eftir vrakinum av Norsku Løvu, ið sakk á Lambavík nýggjársaftan í 1707. Fyri 14 døgum kavaðu menn frá Faroe Dive í tveir dagar og tóku myndir staðnum. Endamálið við kavingini var at staðfesta, um vraklutir vóru at finna ella ikki. Leitað varð eisini á landi eftir møguligum sporum eftir hendingini í 1707. Tann fyrra dagin varð serligur dentur lagdur á, at leita á trimum avmarkaðum økjum. Á tí seinasta økinum, hevði bóndin Magnus Rasmussen úr Lamba sæð eitthvørt serstakt á botni, tá hann var burtur í haga. Tað vísti seg at verða steinar úr granitti. Jarðfrøðingar, ið vitjaðu bóndan 28.mai vóru á einum máli um, at steinarnir vóru ikki føroyskir, og at grótslagið var granit. Í sjeytiárunum funnu Arnbjørn R. Thomsen, sáli, og aðrir lutir av Norsku Løvu. Millum annað eina koparplátu.

# Mentað mentanarnátt

**Býurin sjóðaði av lívi á Mentanarnáttini í Havn fríggjakvøldið. Um allan býin vóru tiltøk og tilboð til ung og gomul, sum spákaðu sær ein túr í góðveðrinum til langt út á kvøldið. Roykurin av vaflum og kaffi, saman við hugnaligum práti og góðum tónum myndaði hýrin í býnum. Eins og undanfarin ár fyltu listin og tónleikurin nógv, á mentanarnáttini, og hetta er veruliga nakað, sum lokkar nógv fólk til. Hóast klokkan var farin av 22, tá Summarframsýningin varð sett í Norðurlandahúsinum, vóru ongin tekin um, at fólk vóru á veg til hús. Heldur tvørturímóti ...**

MENTANARNÁTT
*Rigmor Dam/Anna V. Ellingsgaard*



*Klokkan 22 var Summarframsýningin 2008 sett í Norðurlandahúsinum. 13 listafólk eru við á framsýningini í ár, og hava tey øll tikið støði í orðinum "Kanska" í listaverkunum. Grøni veggurin hjá Edwardi Fuglø í forhøllini fekk flestu áskoðararnar at steðga á eina løtu, áðrenn tey fóru víðari til hini mongu verkini*



*Tað var næstan sum á Ólavsøku, tá Mentanarnáttin varð sett á Vaglinum. Fólk hildu á til seint út á kvøldið, tá mong nýttu høvi at fáa sær ein bita ella okkurt drekkandi í góðveðrinum*



*Ein ørgrynna av fittum, litføgrum Kariussum og Baktussum settu dám á Mentanarnáttina. Tað vóru tannrøktararnir í Havn, sum mintu børnini á at busta tenn. Afturfyri fingu tey øll alskyns frukt og grønmeti í sera hugnaliga umhvørvinum í Grasagarði*



*Í Rit & Rák var skipað fyri upplestri av yrkingum. Ein røð av ungum yrkjarum nýttu høvið hetta kvøldið at lesa egnar yrkingar upp. Her er tað Ditte M. Joensen úr Vestmanna, ið lesur upp yrkingina "Oyggjarvegir". Í bakgrundini sæst 17 ára gamla Bjørk Olsen, ið eisini las nakrar av sínum yrkingum upp hetta kvøldið*



*Í Gamla Realskúla varð skipað fyri framsýning av tekningum, sum børn, ið gingu í Mellem- og Realskole í 50-árunum, høvdu teknað. Í vælkomstrøðu fegnaðist Heðin Mortensen, borgarstjóri, um, at tekningarnar umsíðir vóru 'komnar heim' til Realskúlan, har tær upprunaliga vóru teknaðar. Millum tekningarnar sóu vit hesa, sum listamaðurin, Bárður Jákupsson teknaði, tá hann var 13 ára gamal ...*